# RELLINI Í HAVN

Bygdadreingir og bygdamenn vóru ein hóttan á summum økjum í Havn. Har vóru bara eini ráð: At gerast havnarfólk og havnardreingir! Vælkent fyribrigdi millum grannar um allan heim. Tað livst við tí, og er ikki verri enn, at hesi somu bygdafólk ofta hava havt sama atburð móti egnum smærri grannum heima í bygdini.

Hetta er so eitt! Verri, og tað ið undraði meira, var at meðan vit vistu og vildu vita alt um Havnina, vistu havnardreingir einki um bygdirnar. Og vildu heldur ikki vita. Havnin var heimsins nalvi, og einki var nakað vert uttanfyri!

Heilt galið verður, tá hin argaði ger myndina hjá teimum argandi um seg til sína egnu. Hans Andrias hevði eina søgu í Barnabókini um eina gentu, ið hevði verið niðri og tænt, og nú var so fín, at hon bara tosaði danskt. Ikki fyrr enn hon steig á rívutindarnar ein dagin í bønum og fekk rívuskaftið í andlitið, tók hon hvassliga til orðanna á føroyskum.

Algierski sálafrøðingurin Franz Fanon skrivaði um hetta longu í fimtiárunum, at fólk í Algier, ið stríddust móti franska hjáveldinum og einum nýggjum Algier, gjørdu tað við eini fyrimynd um sítt heimland, tey høvdu tikið við úr fronskum hugmyndum um Algier og fólk og mentan har. Tey stríddust fyri at skapa eitt Algier eftir fronsku myndunum um landið.

Ofta síggi eg tað aftur í Føroyum. Ikki minst hjá mentafólki í Havn, teimum sjálvútnevndu føroysku kosmopolittunum. Hetta at síggja okkum sjálv við eygunum hjá okkara stóru grannum – dønum. Eg síggi eitt drag av hesum í skrivingini hjá William Heinesen til dømis. Hann lýsir við hvørt føroyingar sum eksotiskar, júst á ein hátt, ið fellur í smakk hjá dannaðum dønum.

Men týðiligast kanska sæst hetta í málningalistini. Føroyskir landslagsmálarar – serliga – hava tikið við einum stíli, ið danskir ummælarar kalla Færøkunst. Hesir málarar framleiða sína list til ein marknað – bæði pekunieran og estetiskan – ið svermar fyri Færøkunst.

Tað er so eitt. At dønum dámar tað, teimum dámar. Og at føroysk listafólk mála til ein marknað,

Verri, og tað ið undrar meira, er at listvitar í Føroyum og føroyskir listummælarar (tey búgva øll í Havn!) hava tikið við hesum smakkið og gera hann til ediliga føroyska fyrimynd, endaligt kvalitetskriterium og sanna raison d´étre í føroyska listheiminum. Tað verður sum í Algier.

Og tá kunna vit tosa um bygdafrell í Havn.

● ● ● ●

*ASTRI LUIHN (FO): "Guillemot blues" 140 x 170 cm (2006) Acrylic and ink on canvas. Photo: Per á Hædd*



*THORDIS ALDA SIGURDARDOTTIR (IS): "Kitchen Life (2004)*



# FORMA ÚTJAÐARA-ROYNDIR OG LISTALIG AFTURSVAR

*Paul M.W. Hackett, PhD*

Umhvørvis sálarfrøðingur og listamaður. Faculty of Media, Art and Communication, University of Gloucestershire, Cheltenham, UK.

Í verkum mínum fáist eg við ta personligu merkingina av útjaðararoyndum og royni at áseta sálarligu partarnar í provinsialitetinum. Urbanitetur sæst í vaksandi stórbýunum, býarstaturin er miðdepil hjá handli, framleiðslu, sølu og bústaðarmenning. Í positivari merking hevur býurin vítt útsýni, í negativari er hann sjálvgóður og sjálvhevjandi. Urbanisering er eitt heimsumfatandi fyribrigdi og hevur við sær einsháttan í umrøðuni av innan- og uttanhýsis viðurskiftum. Urban einsháttan skapar tað provinsiella í tí øvugta og í kjalarvørrinum á tí, grør fram eina útihýsandi gongd. Eitt nú er London í størri og størri mun vorðin miðdepilin í Bretlandi og er um at vera ein statur í egnum rætti, sum ger øll onnur øki enn meira provinsiel sum "ikki-London".

List er bæði aftursvar til tíðarskeiðið og til fysisku staðsetingina. Bæði fysisk og psykisk avbyrging eru partar í skilmarkingini av provinsialiteti og provinsiellari list, sum tí kann setast á básin "outsidaralist". Tøkni kann lata upp nýggjar møguleikar, tí hon minkar um avbyrgingina og munirnar. Í verkum mínum kanni eg provinsialitet sum úrslit bæði av sálarligari og fysiskari avbyrging í Bretlandi, Norðurlondum/ Grønlandi og í einum býar-bygda samteksti.

Arbeiðslagið í mínum verkum, sum viðgera hugtakið provinsialitet, er tvíbýtt. Í fyrra lagi havi eg arbeitt sum umhvørvissálarfrøðingur og í øðrum lagi sum listamaður. Í fyrra leiklutinum havi eg havt áhuga fyri sosialum rákum og sálarligu støðu teirra. Í tí seinna havi eg sett fram svar, sum fara yvir um markið millum tað provinsiella og tað urbana, og samstundis umboða bæði gjøgnum at brúka vanligar sálarfrøðiligar grundreglur sum virðismeta tað upprunaliga og tað einsýna í tí provinsiella.

Eitt net sum listalig mynd hevur verið ein týðandi partur av royndum mínum at røkka hesum málum. Geometriska mynstrið, sum er kent sum eitt net, kann í fyrstu atløgu tykjast at vera mótsetningur til tað provinsiella. Tað stíva og linjubeina kann tykjast vera ósambærligt við upplivingina av tí lokala, natúrliga, móðurmálsliga, lívrunna og eksotiska. Netskipan er parallel við býardám. Kortini vil eg tala fyri, at sálarstøðið undir netinum er djúpari og almennari enn so. Knattnet, sum verða brúkt í korttekning, gera okkum før fyri at staðseta okkum sjálv i mun til provinsiella (og eisini urbana) umhvørvið. Netskipanir í listaverkum sum hjá íslendinginum Georg Guðni skipa fatan okkara av tí provinsiella á menniskjaligan hátt.

Pláss – líkamikið um tey eru provinsiell ella urban – verða upplivað gjøgnum sama sálarliga strukturella myndil. Sovorðnir strukturellir myndlar brúka eftirmetingar sum samfelagslyndi, spatialitet, fysisk metingarstig og metingar av persónligu ætlanini við eini staðseting. Eisini list endurspeglar plássini, har hon er skapað, í sama strukturella skili. Munurin á tí urbana og tí provinsiella eru virðini, sum eru knýtt at plássunum. Fjølmiðlarnir gera "søgur" um pláss: klisjéir og myndir. Elitan og tey ráðandi í samfelagnum seta fram virði og gloyma tað provinsiella, sum er sett eftir um outsidari, sum hin. Listafólk virka millum slíkar virðisplágaðar klisjéir heldur enn at skapa tær. Tað er kortini við at skilja hesi virði, at listafólk eru før fyri at skapa lýsandi aftursvar.

● ● ● ●